Hann kennir hálvgloymdar ræsur

Deksbáturin Ólavur úr Vestmanna er 72 ára gamal og aftur farin at flyta ferðafólk um Vestmannasund. Hann varð smíðaður til rutusigling, og er nú, verkfall er, aftur farin at flyta fólk um Sundið

SAMFERÐSLA
Edvard Jensen

Á Oyrargjógv er sum umborð á Vaagen, tá.....»har lá hvørt um annað vavt, bæði posar, kistur og menn«

Mynd: Edvard Joensen

á Vestmannasundi: Tað er sum í grind, nú allir bátarnir kappast um at sleppa at flyta ferðafólk um Vestmannasund, tí strandfaraskipini ikki sigla.

Við ferjuleguna í Vestmanna, uttan á Sam sum er lagdur har, liggur gamli Ólavur, sum í 1930 varð smíðaður til at flyta fólk millum oyggjarnar. Hann er nýliga umvældur og er í rættiliga góðum standi.

Veteranurin á økinum, Alfred Olsen í Vestmanna, stendur í stýrihúshurðini. Hann greiðir frá, at hann sigldi við Ólavi um Vestmannasund í 20 ár. Frá 1945 til 1965, tá Bragd byrjaði at sigla.

Alfred er klárur at bakka frá. Tað eru nøkur fólk við. Ikki so øgiliga nógv, tí bussurin, sum kom við ferðafólkinum, sum skal við flogfarinum, vendi og fór yvir til bátahylin, har teir nýmótans glastrevjabátarnir, sum ganga skjótt, liggja.

Ein fremmandur maður, hann tosar enskt, men er ivaleyst eystaneftir, skilst, kemur inn á dekkið á Sam. Hóast onkur, hann hevur samband við í Føroyum, hevur koyrt hann úr Havn til Vestmanna, veit hann ikki rættiliga, hvussu mannagongdin er, og heldur ivaleyst, at hetta er tann lítla ferjan, sum sigla skal. Hevur hug at fara inn í gongina, men verður vístur umborð á hendan lítla, sum liggur við síðuna av. Maðurin ivast eit sindur, er líkt til, men fer so, og er als ikki misnøgdur kortini. Hetta tykist vera eitt upplivilsi fyri hann.

Tó skilir hann ikki, at kioskin við ferjuleguna er stongd, hóast tann stóra ferjan ikki siglir. Hann ætlaði at keypa sær sigarettir, greiðir hann frá, men slapp ikki inn.

Tað kemur ein bilur afturat oman til ferjuleguna. Foreldur, sum koyra eina unga kvinnu til ferjuna. Rópt verður umborð at vita, um tað slepst við. Jú, tað er gaman í. Bara at koma inn á bógvin. Onkur av hinum ferðafólkunum tekur kuffertini hjá ungu kvinnuni. Klemm og muss á bryggjuni, og so er hon sum eitt fok á bakkanum.

Alfred sær, at bussurin við flogferðafólkunum, hann væntaði at fáa, er farin yvir til teir nýggju bátarnar, so hann bakkar frá og setir kós móti Oyrargjógv við teimum, sum komin eru. Ikki heilt einki kortini.

Ólavur er útgjørdur við hálvtannaðhundrað hestakreftum í maskinrúminum, so hann gongur bara heilt skjótt. Øll eru á dekkinum fyrstu løtuna, men sum vit nærkast sjálvum sundinum, er onkur, sum fer niður í lugarið, har kabússan er tendrað, so heitt og fjálgt er.

Hyggi niður. Beinkir eru í bæði borð, men bert skott. Eingin koyggja. Gasskabússin logar afturi móti lastaskottinum, og undir leytaranum og niður við kabússini er klemmingarútgerð til nógv fólk. Telji ikki, men siggi, at til tey, sum her eru umborð, er ivaleyst.

Eg fari uppaftur. Fram á bakkan og siggi, at afturút koma minst tríggir bátar skúmandi aftan á okkum. Einnir tveir ganga øgiliga skjótt, siggi eg.

Tað er beinanveg, so er annar á kroppinum. Ein sonevndur speedbátur, sum bara hevur skrúvuna í vatni. Eini tríggir ferðamenn sita samankropnir aftan fyri rútin, sum er einasta lívd á hesum opna farinum, sum eftir, sum tosað verður umborð á Ólavi, ikki skuldi sloppið at siglt soleiðis. Ivasamt um tað er forsvarligt. Og í hvussu er er tað tápuligt, tosa tey umborð hjá okkum.

Í hinum borðinum er ein størri glastrevjabátur við at yvirhála okkum. Tórshavn stendur á reyvini. Hann hevur væl av fólki umborð og strýkur fram við landinum.

– Jú, havnarmenn tykjast eisini hava sæð møguleikan í at vinna sær nakrar krónur til ein dýran bát, sum kanska ikki tjenar so nógv innaftur, sum væntað varð, tá hann varð keyptur, heldur enn av ferðamonnunum, sum stendur undir lídini á mær.

Á Oyrargjógv er ferðsla alla tíðina. Ein bussur stendur á ferjubakkanum og bíðar eftir fólki. Hann er komin nakað væl fyri tíðina, sum stendur í ferðaætlanini, soleiðis at fólk sleppa at sita, beinanveg tey koma við teimum ymsu bátunum.

Teir skjótu glastrevjabátarnir eru longu farnir avstað aftur, og ein føroyskur træbátur kemur aftan á okkum. Hann hevur ivaleyst eisini nógv fólk við.

Ólavur leggur at bryggjuni norðanfyri. Ein ferðamaður blakar springið í land, og onkur er á landi, sum setir fast.

Fólk fara í land við viðføri sínum, og alt fer í bussin, sum skal flyta tey flestu út á flogvøllin.

Opni báturin leggur at sunnantil við brúnna og skip-ar upp. Fólk og viðføri í eina rúgvu.

Norðanfyri hevur Alfred aftur loyst springið og er á veg yvir aftur á Vestmanna. Einsamallur at vita, um onkur er, sum skal um aftur sundið.

Seinni út á fyrrapartin koma ferðafólkini, sum komin eru við Maersk flogfarinum. Tá ræður so um at vera aftur á Oyrargjógv fyri at sleppa at føra tey yvir á Vestmanna.

Men fólk eru samd um, at tað er ongantíð betri samband um Sundið, enn júst tá verkfall er.

Teir skjóttgangandi glastrevjabátarnir flyta nógv fólk um sundið. Líkt er til at eisini havnarmenn síggja møguleikan í at vinna nakrar krónur á hendan hátt

Mynd: Edvard Joensen

Mær dámar tað einki

Ein teirra, sum flytir fólk um Vestmannasund, nú verkfall er, heldur, at tað er ikki heilt í lagi at gera so, men vil kortini ikki bara standa og hyggja at, meðan fólk ferðast

FLUTNINGUR
Edvard Joensen

Alfred Olsen, hm., stendur í stýrihúshurðini og kennir seg aftur á gomlum leiðum, tá hann var einsamallur um at flyta fólk í fastari rutu um Vestmannasund

Mynd: Edvard Joensen

Vestmanna: – Tá eg skal vera heilt erligur, so dámar mær tað einki, sigur Alfred Olsen, sum er farin at flyta fólk um Vestmannasund, nú strandfaraskipið Ternan er rakt av verkfalli.

Spurningurin er einfaldur. Hvussu tað kennist at vera verkfalsbrótari soleiðis, tá ein tekur upp arbeiði, sum aðrir hava lagt niður í lønarstríði.

– Eg má siga heilt erliga, at eg haldi tað vera skeivt. Men hinvegin vil eg heldur ikki bara standa og hyggja at, meðan aðrir sigla, sigur Alfred Olsen í Vestmanna, sum er farin at flyta fólk og post um Vestmannasund við gamla deksbátinum Ólavi.

Alfred er kendur á leiðini. Hann sigldi við Ólavi um Vestmannasund í 20 ár frá 1945 til 1965, tá hann fekk bilferjuna Bragd.

Síðan átti hann Sam – tveir vóru teir – áðrenn Strandferðslan yvirtók hann, og Alfred fór aðrastaðni at sigla.

Ólavur hevur eisini verið aðrastaðni enn um Vestmannasund, við ferðafólki, veit Alfred at siga frá. Hann plagdi fyrr at loysa onnur Strandfaraskip av, og hevur verið runt landið.

– At kalla allar oyggjarnar hevur hann vitja, greiðir Alfred Olsen frá.

Nú rógva teir dagliga út báðir, Alfred og Ólavur. Báturin varð umvældur fyri stuttum og hevur tikið nakað at skula forsvara.

– So tað er eyðsæð, at ein roynir at vera við har, nakað er, sigur Alfred Olsen, fólkaflutningsveteranur úr Vestmanna.

UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

Ov lítil kapping

Danski búskapar- og vinnumálaráðharrin, Bendt Bendtsen, heldur, at alt ov lítil kapping eru millum teir donsku peningastovnarnar. Hann heldur eisini, at peningastovnarnir eru alt ov vánaligir til at veita viðskiftafólkum um upplýsingar.

Bendt Bendtsen heldur eisini, at tað er alt ov dýrt hjá fólki at skifta peningastovn, og at gjaldið, sum peningastovnarnir taka frá fólki, sum skifta stovn, er alt ov ymiskt.

Óhapp ávirkaði

Óhappið í Milano hósdagin, tá eitt lítið flogfar rendi á eini háhús, fekk alt fyri eitt ávirkan á virðisbrævamarknaðunum í Evropa og í USA. Á Dow Jones í New York fall støðið 1,6 prosent, so skjótt tíðindini bórust úr Milano, men tá tað seinni varð kunngjørt, at talan var um eitt óhapp og ikki eina yvirgangsatsókn, gjørdist marknaðurin støðugur aftur.

Í Evropa fekk óhappið eisini ávirkan. Á virðisbrævamarknaðinum í Frankfurt var fallið 2,2 prosent, og hóast italsku myndugleikarnir vissaðu fólk um, at talan var um eitt óhapp, varð úrslitið kortini eitt fall upp á 1,2 prosent. Serfrøðingar væntaðu, at marknaðurin fór at koma í rættlag í gjár.

Leggja saman

Ein fyribilsuppgerð av atkvøðunum hjá partaeigarunum í teimum báðum stóru amerikansku teldufyritøkunum Hewlett Packard og Compaq vísir, at meiriluti er fyri at leggja fyritøkurnar saman.

Meirilutin er tó ikki stórur, og roknað verður við, at tey, sum eru ímóti samanleggingini, fara at gera eina seinastu roynd at fyribyrgja samanleggingini. Kortini væntar stjórin í HP, Carly Fiolina, at samanleggingin verður endaliga staðfest tíðliga í næsta mánað.

Aftur eitt mistak í Linate-floghavnini?

Pirelli-bygningurin í Milano fekk stóran skaða, tá tað lítla flogfarið rendi á hann

Mynd: Reuters

Vanlukkan, tá eitt lítið flogfar rendi á eini háhús í Milano hósdagin, stóðst kanska av einari misskiljing

FLOGVANLUKKA
Árni Joensen

Trý fólk doyðu, og umleið 60 fingu skaða, tá eitt lítið flogfar rendi á Pirellisháhúsini í Milano um fimm-tíðina hósdagin. Eeldur kom í húsini, men tað eydnaðist rættiliga skjótt at basa eldinum.

Í gjár skrivaði Milanoblaðið Corriere della Sera, at nógv bendir á, at vanlukkan stóðst av einari misskiljing.

Blaðið skrivaði, at tá tann 67 ára gamli flogskiparin, Gino Fasulo, skuldi gera klárt at lenda í Linate-floghavnini, boðaði hann frá, at hann hevði trupulleikar við lendingartólunum. Á bandupptøkuni av samskiftinum millum flogskiparan og floghavnina hoyrist, at flogleiðslan bað flogskiparan halda seg tætt við floghavnina.

Júst um sama mundið bað ein tyrla um lendingarloyvi, men maðurin í flogtorninum í Linate bað tyrluskiparan halda seg burtur frá floghavnini.

Í somu løtu svaraði Gino Fasulo, at hann hevði skilt boðini, og tað lítla flogfarið setti kós inn yvir Milano. Í torninum royndu teir at rópa á hann, men fingu einki svar.

Ein misskiljing í Linate floghavnini kostaði í fjør meiri enn hundrað mannalív, tá eitt flogfar hjá SAS og eitt lítið týskt flogfar stoyttu saman á breytini.

Ísraelska framferðin í Jenin eigur at verða kannað

Ísraelska stjórnin avsannar, at hermenn hennara framdu hópmorð í flóttafólkaleguni Jenin, men fleiri vilja kortini hava staðfest, hvat veruliga hendi, tá ísraelski herurin fór inn í leguna tann 3. apríl

MIÐEYSTUR
Árni Joensen

Eingin veit, hvussu nógvir palestinar doyðu í flóttafólkaleguni Jenin. Palestinskir talsmenn hava sagt, at umleið 500 fólk doyðu, tá ísraelskir stríðsvognar og gravkýr fóru inn í leguna. Sambært teimum palestinsku talsmonnunum skutu stríðsvognarnir eftir húsum, sjálvt um fólk vóru inni, og gravkýrnar javnaðu eisini fleiri hús við jørðina, meðan fólk vóru inni í húsunum. Tí vilja palestinararnir vera við, at nógv fólk liggja deyð undir húsaleivdunum. Ísraelskir talsmenn hava víst hesum aftur. Teir halda, at minni enn hundrað fólk doyðu í Jenin.

ST-embætismenn, sum vóru í Jenin hósdagin, siga, at har sær ræðuligt út. Serligi ST-sendimaðurin, norðmaðurin Terje Rød Larsen, segði við tíðindafólk, at Jenin líkist mest einum jarðskjálvtaøki. Hann helt tað vera burtur av allari leið, at ísraelski herurin hevur havt útgongubann í gildi í Jenin í ellivu dagar, og at herurin sýtti hjálparfelagsskapum atgongd til tey neyðstøddu í leguni.

- Eg síggi tveir brøður, sum royna at toga pápan undan húsaleivdunum. Vit síggja eisini, at ein 12 ára gamal drongur verður grivin undan. Hann er illa brendur, segði Terje Rød Larsen við tíðindastovuna AP. Samstundis vístu sjónvarpsmyndir, at líkini av 70 palestinum vórðu jarðað í einari hópgrøv.

Krevja kanning

Alt fleiri og fleiri krevja, at altjóða samfelagið skal kanna, hvat veruliga hendi í Jenin. Bretski uttanríkisráðharrin, Jack Straw, segði aftan á ein fund við ein bretskan diplomat, sum hevði verið í Jenin, at málið eigur at verða kannað.

- Øll prógv, sum eru atkomilig, benda á, at ísraelski herurin hevur nýtt óneyðuga harðrenda framferð. Tað havi eg fingið at vita frá okkara egnu, sum hava verið í Jenin, og hetta er so álvarssamt, at Ísrael eigur at standa til svars fyri tað, sum er hent, segði Jack Straw.

Eisini danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, sigur, at tilburðurin í Jenin eigur at verða kannaður.

Ísrael hevur víst aftur kanningum, og amerikanska stjórnin hevur gjørt greitt, at USA fer at nýta sýtingarrættin, verður kanningarmálið lagt fyri ST.

Úr Norðurlondum:

Heyerdahl deyður

Heimskendi norski rannsóknarmaðurin og ævintýrarin Thor Heyerdahl doyði hósdagin, 87 ára gamal. Heyerdahl hevur leingi verið sjúkur av krabbameini. Hann fekk skurðviðgerð í fjør, men sjúkan versnaði kortini. Hann doyði í heimi sínum í Italia.

Thor Heyerdahl er mest kendur fyri ferðina, sum hann gjørdi við flakanum Kon Tiki um Kyrrahavið. Hann setti sær fyri at prógva, at samband hevði verið millum Suðuramerika og Polynesia í gamlari tíð, og í 1947 eydnaðist honum at sigla við Kon Tiki úr Peru til Tuamotuoyggjarnar í franska Polynesia. Flakin, sum hann nýtti, var úr balsatræi og gjørdur eftir gomlum indianskum sniði.

Í 1969 royndi hann við bátinum Ra I at sigla úr Afrika um Atlantshavið til Amerika. Endamál hansara var at prógva, at samband kann hava verið um Atlantshavið mong ár undan ferð Columbusar, og tí var báturin gjørdur eftir teimum gomlu egyptisku papyrusbátunum.. Ferðin miseydnaðist, men seinni fullførdi hann ferðina við Ra II.

Thor Heyerdahl hevði eisini ta uppfatan, at hámentaninar í gamla Egyptalandi, Mesopotamia og Indusdalinum høvdu sín uppruna í Bahrein við Persaflógvan. Seinni gjørdi hann fleiri rannsóknarferðir - eitt nú við Tigris-ánna og á Maldivunum. Hann var eisini ofta í Peru og á Tenerife, har hann javnan búði.

Umfram ferðirnar á sjónum gjørdi Thor Heyerdahl ein hóp av jarðfrøðiligum og fornfrøðiligum kanningum. Hann hevur skrivað fleiri bøkur um arbeiði sítt. Serliga kend er bókin um ferðina við Kon Tiki, og hon er týdd til 62 mál.

Thor Heyerdahl var føddur í Larvik í 1914. Hann las upprunaliga zoologi og fór í tí sambandi til oynna Fatuhiva í Kyrrahavinum at kanna djóralívið har. Tað var á hesari ferðini, at hann fekk áhuga fyri Kyrrahavsøkinum.